## Uppreistrarleiðari tikin



Laurent Nkunda, sum hevur staðið á odda fyri uppreistrarmonnunum í Demokratiska Lýðveldinum Kongo, er tikin í grannalandinum Rwanda. Í einari felags fráboðan frá herleiðslunum í teimum báðum londunum stendur, at Laurent Nkunda bleiv tikin, tá hann royndi at forða teimum báðum londunum at fremja eitt felags hernaðarátak har eysturi í DLKongo. Teir seinastu dagarnar hevur kongolesiski stjórnarherurin framt fleiri álop á uppreistrarmenninar, og hann hevur fingið hjálp frá stjórnarhermonnum úr Rwanda.

## Tíðin fer til at skriva

Danskir sjúkrarøktarfrøðingar brúka 20 prosent av teirri dagligu arbeiðstíðini til at útfylla oyðubløð og sjúklingajournalir, og 80 prosent av sjúkrarøktarfrøðingunum halda, at tað mesta ar hesum arbeiðinum er óneyðugt, tí læknarnir skriva tað sama kortini. Hetta sæst í einari kanning, sum Megafon hevur gjørt fyri fakblaðið Sygeplejersken. Felagið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum vil hava fleiri elektroniskar journalir, og Jakob Axel Nielsen, heilsumálaráðharri, lovar at kanna, hvat kann gerast fyri at gera pappírsarbeiðið einfaldari.

# Yvir 300 næmingar mótmæla p

**Studentaskúla- og HF-næmingar úr øllum Føroyum kenna seg niðurtraðkaðar av Mentamálaráðnum. Orsøkin er broytingar í skrivligu próvtøkunum í donskum og enskum á hástigi, sum tey ikki fyrr enn nú hava fingið at vita um. Nú krevja tey broytingarnar afturtiknar**



MÓTMÆLI

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Miðnámsskúlanæmingar úr øllum teimum seinastu árgangunum í studentaskúlunum og HF-skeiðunum í Føroyum føla seg í hesum døgum sera illa viðfarin av Mentamálaráðnum.

Orsøkin til at tey føla seg illa viðfarin er, at Mentamálaráðið nýliga hevur viðtikið eina broyting av skrivligu próvtøkunum hjá fráfarandi miðnámsflokkunum.

Tann nýggja broytingin av skipanini ger, at tann skrivliga próvtøkan í donskum og enskum á hástigi kemur at síggja øðrvísi út enn undanfarin ár.

– Broytingarnar í sær sjálvum eru fínar, okkum dámar tær væl. Trupulleikin er bara tann, at vit ikki fáa at vita um broytingarnar fyrr enn nú hálvt ár áðrenn endaligu próvtøkurnar, og at vit tí ongan sum helst møguleika hava at fyrireika okkum 100 prosent til broytingarnar, sigur Annika Due Petersen, ið er lesandi á seinasta ári í Studentaskúlanum á Kambsdali.

Saman við Marnar S. Kristiansen og øðrum næmingum, ið eisini skulu upp til endaligu royndirnar í summar, hevur hon tikið stig til eitt mótmælisskriv, sum saman við yvir 300 undirskriftum frá næmingum verður handað Mentamálaráðnum í dag.

### Alt dottið á gólvið

Broytingarnar eru gjørdar í uppgávunum, ið næmingarnir skulu loysa til skrivligu royndirnar nú í vár og til endaligu skrivligu próvtøkurnar í summar. Trupulleikin hjá næmingunum, ið verða ávirkaðir, er at tey í tvey og eitt hálvt ár hava arbeitt framm móti teimum skrivligu próvtøkunum, soleiðis sum tær vóru áðrenn broytingina.

– Hetta er rættiliga stressandi. Tað verður ikki hugsað um, at hetta er okkara stríð gjøgnum trý ár, og sum skal geva eitt úrslit, sum verður ávirkað av broytingini. Stórir partar av tí, vit hava stríðst okkum ígjøgnum tey seinastu tvey árini er dottið niðurfyri. Tað ger kanska tað, at øll rúka ein ella fleiri karakterir niður, sigur Marnar S. Kristiansen.

Eitt dømi um broytingarnar, ið eru gjørdar, er at í enskum hava tey lagt stóran dent á at umseta skrivligan tekst á umleið hálva síðu, tí at tað var ein partur av skrivligu próvtøkuni. Nú broytingarnar eru framdar, er umsetingin brádliga ikki partur av próvtøkuni longur, men ístaðin eru fleiri síður av mállæru settar inn ístaðin. Eisini eru útvaldu evnini øðrvísi enn tey, tey hava lært seg at arbeiða við.

– Nýggju evnini eru nú meira handilsskúlalig og samfelagsfrøðilig, har tey áðrenn vóru meira bókmentalig. Evnini eru góð, men vit hava bara ikki lært at loysa hetta slagið av uppgávum, og nú er eingin tíð eftir til endaligu próvtøkurnar, vísir Annika Due Petersen á.

### Sein boð frá Mentamálaráðnum

Næmingarnir harmast eisini at broytingarnar ikki verða fráboðaðar fyrr enn nú.

– Ein stórur trupulleiki er at lærararnir heldur ikki hava fingið boð um broytingarnar fyrr enn nú. Rektarin hjá okkum fekk boð í oktober, at broytingar vóru á veg, men hann fekk ikki hvørjar broytingarnar vóru.